FYLGISKJAL 3

## Hoyringsvar

Viðvíkjandi Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 (Ábyrgdin av dagtilboðum og umlætting til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar)

Javni fegnast um, at ætlanin er at savna ábyrgdina fyri dagtilboð og umlætting til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur. Hetta kann gera skipanina greiðari og tryggja, at færri detta niður ímillum land og kommunu.

Tó vilja vit vísa á:

- Í hoyringarskrivinum verður víst til 19 heimabúgvandi undir 67 ár við tilknýti til demensklinikkina. Vit hava tó fingið upplýst, at eisini fólk á stovnum eru í hesum vandabólki – møguliga 9 við Downs syndrom (talið er við fyrivarni). Talan er sostatt um fleiri enn 19.
- Umframt Downs syndrom eru eisini onnur menningartarn, eitt nú fólk við epilepsi, sum kunnu hava øktan vanda fyri tíðliga demens.
- Tað er ógreitt, hvørt fólk á stovnum fáa somu atgongd til dagtilboð, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing sum heimabúgvandi. Hetta má tryggjast beinleiðis í lógini.
- Serliga er neyðugt við greiðum leiðreglum og útbúgving til starvsfólk, tí fleiri menningartarn hava serligar heilsuligar avbjóðingar, sum krevja tíðliga eygleiðing og serkunnleika.

## Tilmæli frá Javna

1. At lógin beinleiðis fevnir um bæði heimabúgvandi og stovnsbúgvandi.
2. At kommunur og land seta í verk útbúgving og vegleiðing til starvsfólk.
3. At fyribyrging og tíðlig eygleiðing verða raðfest fyri bólkar við serligum vanda fyri demens, eitt nú Downs syndrom og onnur menningartarn.

## Niðurstøða

Javni tekur undir við, at ábyrgdin verður samlað, men tað má tryggjast, at øll fáa jøvnan rætt til tænastur – uttan mun til, um tey búgva heima ella á stovni, og uttan mun til hvørjar heilsuligar avbjóðingar teirra menningartarn førir við sær.

Vinaliga

Javni